**Býráðsfundur mánadagin 28. mars 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

| | **Fundarskrá:** | **Fundarsamtykt:** |
|---|---|---|
| 1. | **11/00141**<br>**Umsókn um byggiloyvi til nýtt spilloljuverk úti á Vík**<br>Umsóknin fevnir um nýtt spilloljuverk og nýggja móttøkustøð til serliga vandamikið burturkast.<br><br>Bygningarnir liggja á matr. nr. 428[b] og samlaða støddin á bygningunum er 656 $m^2$ .<br><br>Prosjektið liggur í málinum.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at geva byggiloyvi til spilloljuverkið og móttøkustøðina. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Tollakur Joensen<br>Páll Isholm<br>Jóhan Christiansen<br>Joen Magnus Rasmussen<br>Terji Lervig<br>Jan E. Petersen<br>Fríðgerð Heinesen<br>Hans Mourits Foldbo<br><br>**Atkvøddi blankt:**<br>Hanna Jensen |
| 2. | **11/00159**<br>**Umsókn um byggiloyvi til køli – og pakkihøll á matr. nr. 106c, Norðragøtu**<br>Fiskavirkið P/F í Norðragøtu søkir um byggiloyvi til víðkan av bygninginum norðanfyri. Víðkanin fevnir um kølihús/pakkihøll ið er 408 $m^2$.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at, geva byggiloyvi til køli- og pakkihøll á matr. nr. 196c í Norðragøtu, og at broyta leigusáttmálan við tilsvarandi fermetrum | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |
| 3. | **11/00145**<br>**Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 79 í Syðrugøtu**<br>Poul Arni Jacobsen søkir um byggiloyvi á omanfyri nevnda matrikul.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at viðgera málið á fyrst komandi býráðsfundi. | Einmælt samtykt at beina málið aftur í teknisku umsiting. |

**Býráðsfundur mánadagin 28. mars 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

**4. 11/00127**

**Umsókn um byggiloyvi og um loyvi at byggja í mark, ella at keypa meira lendi**

Lív Gregersen og Aron Olsen ið hava keypt grundstykkið í Gøtu kommunu, søkir um loyvi at byggja í mark, ella at keypa meira lendi.

Meirlutiní teknisku nevnd, Terji Lervig og Joen Magnus Rasmussen mæla til at fylgja tilmælinum hjá teknisku umsitingini, um ikki at ganga umsókinin á møti. Minnilutin, Tollakur Joensen mælir til at umsøkjarin fær loyvi til at keypa lendið frá kommununi at rætta stykkið upp við.

Fyrst varð atkvøtt um uppskoti hjá minnilutanum í teknisku nevnd, og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Tollakur Joensen

**Atkvøður ímóti**
Páll Isholm
Jóhan Christiansen
Joen Magnus Rasmussen
Terji Lervig
Hans Mourits Foldbo
Jan E. Petersen

**Atkvøddi blankt:**
Hanna Jensen
Fríðgerð Heinesen

Síðani varð atkvøtt um uppskoti hjá meirlutanum í teknisku nevnd, og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Páll Isholm
Jóhan Christiansen
Joen Magnus Rasmussen
Terji Lervig
Jan E. Petersen
Hanna Jensen
Fríðgerð Heinesen
Hans Mourits Foldbo

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

**5. 11/00029**

**Umsókn frá G! Grunninum um stuðul**

G! Grunnurin hevur søkt um stuðul á kr. 200.000

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Býráðsfundur mánadagin 28. mars 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

Trivnaðarnevndin mælir til at stuðla við kr. 150.000.

Peningurin verður tikin av konto nr. 5.24.13 – 30 "Ymisk mentanartiltøk"

Fíggarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

**6. 11/00146**
**Økið við Torvalds kafé í Norðragøtu**
Hanna Jensen hevur biðið um at fáa økið við Torvalds kafé gjørt trygt fyri fólk og at hamp økið.

Tekniska umsitingin hevur kanna málið, og hevur gjørt eitt uppskot og kostna fyri arbeiðið. Kostnaðarmetingin er uml. kr. 150.000,00 uttan mvg.

Skal arbeiðið gerðast í inniverandi ári, verður neyðugt við eini eykajáttan til arbeiðið.

Meirlutin í teknisku nevnd, Terji Lervig og Joen Magnus Rasmussen mæla frá at gerða arbeiði í ár, men mæla til arbeiðið kemur á fíggjaætlanini fyri 2012. Minnilutin, Tollakur Joensen mælir til, vegna trygdina, at gera arbeiðið í ár.

Fíggarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum hjá teknisku nevnd.

Fyrst varð atkvøtt um uppskoti hjá minnilutanum í teknisku nevnd, og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Tollakur Joensen
Páll Isholm
Hanna Jensen

**Átkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen
Joen Magnus Rasmussen
Terji Lervig
Hans Mourits Foldbo

**Atkvøddi blankt:**
Jan E. Petersen
Fríðgerð Heinesen

Síðani varð atkvøtt um uppskoti hjá meirlutanum í teknisku nevnd, og bleiv tað einmælt samtykt

Eisini varð einmælt samtykt at seta hegn upp fyri at tryggja økið

**7. 11/00163**
**Sáttmáli millum Eysturkommunu og EM Ráðgeving viðv. Sarpugerði**
Uppskot til sáttmála fyriliggur.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur mánadagin 28. mars 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

Umsitingin mælir til at góðkenna fyriliggjandi sáttmála.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við fyriliggjandi sáttmála. Tó verða punkt 3, 4 og 5 í grein 6 strikaði.

**8. 11/00150**

**Leiga av brunastøð**

Eysturkommuna hevur leigusáttmála við Effostøðina í Leirvík um hølir til sløkkiliðsbilar. Verandi sáttmáli gongur út 31.12.2011. Møguleiki er at halda áfram við leigusáttmálanum í 2 ella 3 ár meir, tó verður leigan hækkað nakað

Á fundi 3. mars 2011 mælir brunanevndin til, at halda verandi sáttmála og at kommunan finnur eina varandi loysn viðvíkjandi framtíðar brunastøð.

Tekniska nevnd mælir til at fylgja tilmælinum hjá brunanevndini.

Fíggjarnevndin mælir til at leingja verandi sáttmála við 2 árum, ímeðan arbeitt verður við eini varandi loysn.

Einmælt samtykt at leingja verandi sáttmála, ímeðan arbeitt verður við eini varandi loysn.

**9. 11/00140**

**Áheitan, frá Gøtu skúlastýri, um liðugtgerð av arbeiði av Gøtu skúla**

Skúlastýri fyri Gøtu skúla hevur sent kommununi eina áheinan um at fáa ymisk arbeiðir í Gøtu skúla gjørd liðug

Tilmæli frá umsitingini fyriliggur. Umsitingin mælir til at heimkunnleikastovan og ovara helvt av nýggja skúlaplássinum, verður gjørt liðugt. Hetta krevur eina eykajáttan á kr. 1,2 mió. kr.

Harumframt verða hesi arbeiði gjørd liðug av

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Býráðsfundur mánadagin 28. mars 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

verandi játtan:

- Liðugtgerð av klædningi við inngongdina til nýggja skúlabygningin
- Hampa/gera nýtt stakitt
- Mold og plantur í kummurnar á skúlaplássinum
- Asfaltera skúlaplássið sunnanfyri skúlan

Trivnaðarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá umsitingini. Restin av ynskjunum frá skúlastýrinum, verða tikin upp í samband við fíggjarætlanararbeiðið 2012.

Tekniska nevnd mælir til at fylgja tilmælinum frá trivnaðarnevndini.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í teknisku nevnd.

Peningurin verður tikin av konto 4.23.22.511 (íløgu í skúlan)

**10. 11/00137**

**Áheitan, frá Gøtu skúlastýri, um at lata svimjihylnin uppaftur**

Skúlastýri fyri Gøtu skúla hevur sent kommununi eina áheinan um at lata svimjihylin í Gøtu uppaftur.

Tilmæli frá umsitingini fyriliggur. Umsitingin mælir frá at lata svimjihylin uppaftur. Um avgjørt verður at lata svimjihylin uppaftur mælir umsitingin til at hetta í fyrsta lagi verður til skúlaársbyrjan 2012.

Meirlutin í trivnaðarnevndini, Hanna Jensen og Tollakur Joensen, mæla til, at endalig avgerð um framtíðarætlanir fyri svimjihylarnar í Eysturkommunu, verður tikin á fyrstkomandi býráðsfundi. Minnilutin, Páll Isholm, mælir til at

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, um ikki at lata svimjihylin uppaftur.

**Atkvøður fyri:**
Páll Isholm
Jóhan Christiansen
Joen Magnus Rasmussen
Terji Lervig
Jan E. Petersen
Hans Mourits Foldbo
Fríðgerð Heinesen

**Atkvøður ímóti:**
Tollakur Joensen
Hanna Jensen

**Býráðsfundur mánadagin 28. mars 2011 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Joen Magnus Rasmussen, Fríðgerð Heinesen, Páll Isholm , Terji Lervig, Hanna Jensen, Jan Erlingsson Petersen og Tollakur Joensen

**Fundurin lokin kl. 22.00**

taka undir við tilmælinum frá umsitingini.

Meirlutin í teknisku nevnd, Terji Lervig og Joen Magnus Rasmussen mæla til at fylgja tilmælinum frá umsitingini, og mæla somuleiðis til at endalig avgerð um framtíðarætlanirnar fyri svimjihyljarnar verður tikin á fyrst komandi býráðsfundi.
Minnilutin, Tollakur Joensen, mælir til at fylgja tilmælinum frá meirlutanum í trivnaðarnevndini.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í teknisku nevnd.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Terji Lervig ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Joen Magnus Rasmussen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Páll Isholm ______________________________

Fríðgerð Heinesen ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________